# Innlendismálaráðið tvær átalur

**Umboðsmaðurin gevur Innlendismálaráðnum tvær átalur fyri viðgerðartíðina av umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi**

ÁTALA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fyrst í mars í ár lat Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, eina kæru til Løgtingsins Umboðsmann um Innlendismálaráðið. Kæran snúði seg um viðgerðartíðina av umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, og bað Høgni Hoydal Løgtingsins umboðsmann um at kanna og meta viðgerðartíðina av umsóknunum hjá tveimum ávísum persónum, ið hava søkt um varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

Í báðum málunum var niðurstøðan, at Innlendismálaráðið fekk eina átalu fyri viðgerðartíðina. Í grundgevingunum fyri avgerðirnar, førir umboðsmaðurin millum annað fram, at ráðið vísti á vantandi løgfrøðiligan førleika, grundað á skerjingarnar í fyrisitingini á heysti 2004. Men umboðsmaðurin góðtók ikki hesa umbering, tí ráðið hevði sjálvt møguleika at raðfesta, hvussu skerjingarnar skuldu fremjast. Í seinna málinum góðtók umboðsmaðurin ikki umberingina hjá ráðnum um, at talið av akademiskum málsviðgerum var lækkað á heysti 2004. Umboðsmaðurin vísti á týdningin av, at mál verða viðgjørd á forsvarligan hátt, og at viðgerðin ikki eigur at taka longri tíð enn neyðugt er.

# Sosialdemokratarnir ganga nógv fram

**VKO-meirlutin hjá donsku stjórnini er burtur**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



**Danmark:** Meirilutin hjá donsku stjórnini, saman við Danska Fólkaflokkinum, er burtur. Hetta er aðru ferð á rað, at flokkurin hjá Piu K. gongur væl aftur, meðan donsku sosialdemokratarnir hava framgongd.

Flokkurin hevur nú yvirhálað Vinstra, og er, sambært nýggjastu veljarakanningini hjá kanningarstovninum Rambøll, størsti flokkur í Danmark.

Danski Fólkaflokkurin stendur til at missa seks pláss, í mun til somu kanning í august. Seinastu vikurnar hevur nógv rok verið um Danska Fólkaflokkin. Millum annað hevur innanhýsis klandur verið og málið um tekningarnar av Muhammed profeti, sum ungmannafelagið stuttleikaði sær við á eini legu, hava ikki gjørt støðuna betur.

Í sama tíðarskeiðið er Sosialdemokratíið farið fram við 5,5 prosentstigum. Flokkurin hevði fingið 27,9 prosent av atkvøðunum um val var nú, skrivar Jyllands Posten.

# Stórt bókaverk um torv og torvarbeiði




**Petur Jacob Sigvardsen hevur skrivað eitt megnar verk um torv og torvarbeiði í fimm bindum, sum forlagið Búgvin gevur út**

SIÐSØGA

Líka frá landnáminum og langt inn í tjúgundu øld hevur torvið verið eitt afturvendandi stórarbeiði á hvørjum ári hjá forfedrum okkara, tí neyvan hevði nakar kunnað búsett seg her í oyggjunum, var ikki lív á grúgvuni. Tí hevur torvarbeiðið eisini í øldir verið ein sera týdningarmikil táttur í arbeiðsmentan føroyinga.

Av hesum sama hevur torv og torvarbeiði við øllum, sum loðar upp við tað, tí eisini verið ein virðismikil og sera spennandi partur av allari bygdamentanini, ið enn livdi á mannamunni, og sum eisini bar til at eygbera, nema og granska.

Tað er um alla hesa hugvekjandi og virðismiklu mentan, bókaverkið hjá Petur Jacobi Sigvardsen er skrivað á einum leikandi lættum og livandi máli í 10 fjøltáttaðum og sera spennandi høvuðspørtum, ið fevna um 90 kapitlar við umleið 500 ymiskum evnum, sum fest eru á blað.



Innihaldið í bókaverkinum er grundað á eitt stórt og fjølbroytt skjalatilfar úr bløðum, bókum og savnindum úr ymsum skjalagoymslum, og tað er savnað og skipað í eitt skilvíst tíðarhøpi, so til ber hjá lesarunum at eygbera alla torv- og siðsøgu okkara líka úr langeldinum og til endalykt hennara væl inni í 20. øld.

Umfram 200 heimildarfólk hevur rithøvundurin eisini í 20 ár havt bandaðar samrøður við 120 føroyingar kring landið, og eru tað ikki minst hesar mongu frásagnirnar av mannamunni – ikki bert um torv og torvarbeiði, men eisini um mangt og hvat annað, ið teimum var fyri á heiðini og aðrastaðni, sum gera hesa bókarøð so sjáldsama spennandi og áhugaverda at lesa.

Dentur er lagdur á at myndprýða bøkurnar við umleið 700 myndum, sum bæði eru svart/hvítar og í litum, og saman við frálíkum tekningum, strikumyndum, kortum o. ø. er hetta tí eitt hendinga bókaverk, sum vert er at ogna sær.

- Av tí at útgávan er hampiliga væl stuðlað fíggjarliga, skal hesin stuðul eisini koma keyparunum til góðar, sigur høvudin. Tí er avgjørt at selja alt bókaverkið fyri bert 1180 krónur og sostatt lata 40% av tí veruliga søluprísinum í avsláttri til teirra, sum tekna seg fyri verkið á bíleggingarseðili, sum verð-

FRIMÆRKER OG MØNTER SØGES!

Gratis vurdering i Tórshavn på Hotel Föroyar.
Onsdag d. 18. okt. kl. 15-19 samt torsdag d. 19. okt. kl. 13-14

Til vore kommende auktioner søges gl. breve til og fra Færøerne, gl. postkort, fragtbreve og alle former for frimærkesamlinger samt mønter, medaljer, pengesedler og øvrige gamle betalingsmidler.




Medbring Deres samlinger til en gratis og uforpligtende vurdering.

Vi køber også kontant!

Der vil ligeledes være mulighed for vurdering i Deres hjem efter forudgående aftale. Kontakt evt. vor lokale repræsentant Thorolf Björklund på tlf. 313631 for yderligere information eller vort kontor i Danmark.

THOMAS HØILAND AUKTIONER A/S
Muslingevej 40 · DK-8250 Egå
Tlf. +45 86129350 · +45 40324711 · +45 21272198
www.thauctions.com · e-mail: tr@thauctions.com